# Müller – ein merkisverd ætt í Havn – og Müllers pakkhús

Í døgunum 25. juni til 6. august skipar Tórshavnar Býarsavn fyri framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Í ár hava vit valt at taka upp evnið um Müllersfólkini í Havn. Ætlanin var upprunaliga at gera eina framsýning um Ebbu Müller – Frú Müller, ið m.a. var reiðari, men mest kend sum stjóri á DFDS í Føroyum. Skjótt gjørdist greitt, at tað var ikki lætt at skjalfesta hana, tó at hon var sjónlig og virkin í samfelagslívinum. Tí var farið í holt við tey Müllersfólk, ið myndaðu avgreiðsluna hjá DFDS, nevniliga sýslumaðurin H.C. Müller, sum var hann, ið fekk ábyrgdina av Foreinaða í 1866, sonin Søren Emil Müller, sum tók yvir, síðani H.C. (y), ið doyði ungur. Frú Müller var kona H.C. (y), og hon helt fram við DFDS, til hon doyði í


*Framsýningin hjá Býarsavninum í Smiðjuni í Lítluvík er sum sagt opin frá 25. juli til 6. august, allar dagar frá 15.00 til kl. 20.00.*

1967, og at enda Ebbe, sum doyði árið eftir.

Sostatt umboðaði Müller donsku reiðarafyritøkuna eina heila øld, og røktu tey sambandið við farmi og ferðafólki millum Danmark og Føroyar. Men Müllersætttin var meira enn DFDS. Tað sæst í skjølum, at sýslumaðurin H.C., eisini nevndur Gamli Müller, var væl fyri. Hann átti jørð ymsastaðni í Føroyum og harafturat nógvar húsaognir í Havn.

Trý børn hansara vóru í Grønlandi. Tveir synir og ein versonur vóru embætismenn har í eina fjórðingsøld, ein sonur fór yvir til USA. Frá honum frættist ikki aftur, men Søren var við til at flyta býin og Føroyar inn í ta nýggju tíðina við framburði og fyritaksemi.

Verdóttir Søren, Frú Müller, ið var donsk, var víðagitin sum stjóri, reiðari og arbeiðsgevari, men í Havn eisini kend fyri sítt sosiala arbeiði í Asylforeiningini, har kvinnur í Havn royndu at hjálpa har tørvur var hjá fólki í býnum við m.a. og klæðum.

Tá ið vit annars tosa um Müller í dag hugsa vit kanska fyrst og fremst um Müllers pakkhús. Tað var Søren Müller, ið bygdi pakkhúsið. Hann var av teimum størstu vinnulívsmonnunum seinast í 19. og fyrst í 20. øld.

Enn eru søguligar slóðir eftir í pakkhúsinum. Eitt tað fyrsta, sum kemur móti tær inni í pakkhúsinum er roykurin av tjøru. Enn situr hann fastur í húsinum. Á einum veggi stendur 'Müller' við feitum penslastroki, eina aðra staðni er 'E. Müller' prentað við svørtum, við kriti navnið á sluppini, 'Saltaire' – Saltoyra, nøvn á fólki, sum í farnum døgum helst hava arbeitt har, lemmar niður í kjallaran og upp á segloftið. Og uppi á hesum lofti standa framvegis myllurnar á heysiverkinum og básarnir, ella seglkoyggjurnar, eina hjá Pf. Hvannasund til 'King Arthur' og 'Grundick', eina til 'Tre Søskende' og aðrar við.

Á framsýningini eru farmaskjøl frá DFDS, funnin í pakkhúsinum fyri nøkrum árum síðani, læntar av Føroya Landsskjalasavni, sjóvinnulutir og nýggjar fotomyndir úr pakkhúsinum, og myndir av og tekstir um Müllersfólkini. Søguligu myndirnar eru frá Føroya Fornminnissavni, og aðrar læntar við vælvild frá John S. Müller og Óla Jákup Müller.

PREKVALIFIKATIÓN

## Skúladepil í Suðuroy

**Útbjóðandi myndugleiki**
LANDSVERK
Tinghúsvegur 5
FO-100 Tórshavn
www.landsverk.fo
Teldupostur lv@lv.fo

LANDSVERK er byggiharri fyri almennar uppgávur, og henda verkætlan verður útboðin vegna Mentamálaráðið.

**Mannagongd fyri útbjóðing**
Innboðin lisitatión í høvuðsentreprisu í prekvalifikation. Ætlandi verður heitt á 4 – 6 tilboðsgevarar at bjóða.

**Lýsing av verkætlanini**
Verkætlanin umfatar ein heilsuskúla og ein miðnámsskúla í einum til 200 næmingar, tilsamans umleið 3.200 m² í 3 hæddum. Boðið verður út undir einum í høvuðsentreprisu, tó er byggibúningin gjørd frammanundan.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til:

Landsverk
Postboks 78
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn

ella:
lv@lv.fo

Áheitanin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin, 4. september 2006.

**Áheitan um luttøku**
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar út saman við útbjóðingartilfarinum um mánaðarskiftið september/oktober 2006.

**Samtøk og felagsskapir**
Allir luttakarar í einum samtaki ella líknandi felagsskapi skulu geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrging fyri sáttmálanum. Harafturat skulu felagsskapir og samtøk frammanundan tilnevna ein umboðsmann við skjalprógvaðari fulltrú, ið vegna felagsskapin ella samtakið teknar bindandi avtalur við byggiharran.

**Upplýsingar at nýta til prekvalifikatiónina**
Umsøkjarar skulu saman við eini umbøn um luttøku senda hesar upplýsingar:

Upplýsingar um arbeiðstakarans egnu viðurskiftir og tær neyðugu upplýsingarnar og formleikarnar til meting av tí kravdu minstuorku av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slagi.

Upplýsingar um bygnaðin hjá fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðurfelag.

Stutt lýsing av, hvussu uppgávan verður loyst. Dentur verður lagdur á leiðslu og stýring, logistikk, byggitíð, trygging av tilfarsveitingum og góðskutrygging.

Váttan ella trúnaðarváttan um, í hvønn mun arbeiðstakarin hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.

Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við váttan av samlaða umsetninginum í meðal seinastu trý árini.

Upplýsing um árliga meðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni.

Ummæli frá samsvarandi uppgávum.

Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkum, ið verða sett á hesa uppgávu.

Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



Les Sosialin so ert tú við